# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**4. s. e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 deyvagudstænasta við Jónsvein Bech
***Argja kirkja:*** kl. 11, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Kaldbak:*** kl. 12 Bjarni Bæk
***Sørvágur:*** kl 11, Inga Poulsen Dam
***Fuglafjørður:*** kl. 11, Uni Næs
***Hósvík:*** kl. 11, Marjun Bæk
***Skála:*** kl. 11 Jógvan Fríðriksson
***Selatrað:*** kl. 11, Havstein Klein
***Eiði:*** kl. 11 messa, Emil Olsen
***Mikladalur:*** altargangur, kl. 12, Magnus Brahé Jørgensen.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Einki møti hóskvøldið og sunnukvøldið vegna summarstevnu í Klaksvík.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v. Sverra Steinhólm, 1. Tim. 5. 1-16.
Hóskvøldið kl. 20 Møti við Oddmar Steinhólm, úr Ísrael.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Símun Jacobsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudagin Bønarmøti kl. 15.
Sunnudagin Møti kl. 11.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti, ungdómurin hevur summarhugna.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Dánial á Dul Jacobsen talar um evnið; »Skálandi« kristin, kl 22 útimøti frammanfyri býráðshúsið.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
http://www.gospel.fo

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans - Evni: Jóh. ev., kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin er í summarfrí.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Hebron, Argir**
Mikudagin 27. juni kl. 20 Bíbliutími og bønarløta.
Sunnudagin 1. juli kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Jógvan Júst Rasmussen, talar.
Broytingar í vanligu møtitíðunum sunnudagar:
Í summarfrítíðini er eingin sunnudagsskúli og einki møti kl. 12.
Morgunmøti verður longt við uml. 1/2 tíma.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Týsdagin kl. 7 bøn.
Mikudagin kl. 7 bøn.
Hósdagin kl. 7 bøn, kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 7 bøn.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Eyðun Zachariasen
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
Mánadagin kl. 7 bøn, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 bøn fyri Ísrael og býnum.
Leygardagin kl. 22 Úti-Flare.
Sunnudagin kl. 18 Evanglist møti - (Einki morgunmøti)
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Jerzy Kruk, prestur í Mariukirkjuni. Komandi sunnudag gongur talvan fyri Pæturspeningi.
www.katolsk.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Stórur útifundur verður sunnudagin kl. 16 á Pálsoyruni. Talarar frá ymiskum pørtum av landinum. Eftir útifundin kl. 18.30 verður skipað fyri einum »syngið við møti« hvar hesi koma at luttaka: Oasubrøðurnir, Eclesia, Hallmar og Rúni Winther, Hanna og Terji Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Bønarmøti í kvøld 27.6. kl. 20.
Útimøti á torginum klokkan 21, drekka aftaná.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við breyðbróting.
Hetta verður seinasta møti áðrenn summarsteðgin, lýst verður tá vit byrja aftur.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnumorgun kl.10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 11, morgunmøti við Paula Høj. Sangur við Leigh Hjaltalin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 27. juni kl. 20 bíbiltími.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Poul Johan Djurhuus talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 hugnakvøld fyri ung.
Sunnukvøldið kl. 18 møti.
Mánakvøldið 2. juli kl. 20 meinigheitsfundur.

**Getsemane, á Brekku 19**
Týskvøldið kl. 19.30 er bíbliutími v/ Brynleif Steinberg.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti. Ung frá Soli Deo Gloria luttaka.
Leygardagin kl. 10 morgunbøn.
Sunnudagin kl. 11 møti, sunnudagsskúli er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími 1. Pæt. 2. kap.
Sunnudagin kl. 17.30 bøn-& lovsangur, kl. 18 møti.
Øll eru vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
á møtinum mikukvøldið kl. 20 tala Osvald Kjærbo og Svein Petersen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Gjómaður**
Um viðrar skipar felagið Gjómaður fyri útferð á Gjáarskarð leygardagin 30. juni kl. 10 at laða kráir. Nærri boð í útvarpinum.
Havi arbeiðsamboð so sum spaka, trillubør og spann við.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 25. juni***
kl. 10-14 Opið hús
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, dart og onnur spøl
***Tilm. til ólavsøkusøluna í kjallaranum og listaframsýningina á miðhæddini, tlf. 316491***
***Týsdagur 26. juni***
kl. 10-11.30: Sangur. Óli Dahl. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: ***Arbeiðið sum leiðari á eldraøkinum***, Gunnleyg Durhuus. Kjak um eldraøkið. Øll hugskot eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 27. juni***
kl. 10-12.00: Fyrireiking til søluna av bundnum lutum, drekkamunni og pannukøkum í kjallaranum á ólavsøku.
kl. 15 Í dag er túrurin ú tí Havnadal. Randi/Elisabeth, fysioterapeutar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Hósdagin 28. juni***
kl. 10-14.00: Opið hús
kl. 14-16.00: Summar boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 29. juni***
kl. 10-17.00: Opið hús.
***Tilhaldið verður stongt frá 2. juli til ólavsøku.***
***Á ólavsøku verður:***
***27.-31. juli kl. 16-20***
***Listaframsýningin hjá Frits Jóhannesen á miðhæddini.***
***28.-30. juli kl. 16-20***
***Søla av bundnum lutum, pannukøkum og drekkamunni í kjallaranum.***

**Landsfelag Pensjónista**
***Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá týsdegnum 26.6.2007.***
***Opið verður aftur týsdagin 31.7.2007.***
Landsfelag Pensjónista
Tróndargøta 13
100 Tórshavn
tlf. 319394/219394

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava summarferiu, byrja aftur í august.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mikudagin 27. juni.***
Prát og hugni í Tilhaldinum.
***4. juli fara vit til Gjáar. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl 9.45 og vit koma suður aftur kl. 19.15 av Gomlurætt. Við Gjógv eta vit døgurða á Gjáargarði, vitja kirkjuna, hyggja okkum um í bygdini og fáa okkum drekka í gamla handlinum. Neyðugt er við tilmelding á tlf 211921. Kostnaður 375,00 kr.***

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.
***Týsdagin 26/6***
Ættarprát við Mariu Jacobsen, Glyvrar
***Mikudagin 27/6***
Opið hús
***Hósdagin 28/6***
Vit vitja Fornminnissavnið Forna á Glyvrum.
Fara frá Vesturskin kl 15.30
***Tilhaldið fer nú í summarsteðg og byrjar aftur 4. Sept.***

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda

**Prógv**
22. juni fekk Herluf Hansen, Tórshavn, handað prógv frá Danmarks Biblioteksskole sum Cand. Scient Bibl.

Jeanette J. á Argjaboða, Aalborg, hevur 19. juni lokið prógv sum Bachelor í mál og altjóða virkissamskiftið á Aalborg Universitet.

**60 ár**
7. august verður Sigrid Nicodmussen 60 ára gomul.
Veitslan verður hildin í Kelduni í Skálavík 4. august. Frá kl 17.00. Tey, ið vilja gleða Sigrid, biðast siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 361216 ella 221896.

**101 ár**
Jákup V. Hansen, Glyvrar, verður 101 ár mikudagin 27. juni.

**Brúdleyp**
Leygardagin 30. juni kl. 15.00 giftast í Haldarsvíkar kirkju Maj-Britt Hellisdal Tórshavn og Johnny Samuelsen Haldarsvík. Veitslan Verður fyri innbodnum í Pállstovu.

Leygardagin 30. juni kl. 16.00 giftast í Ordrup Kirke Birgitta Ellingsgaard, Tórshavn og Hans Christian Sørensen, Vejle. Veitslan verður fyri innboðin á »Schæffergaarden« Jægersborg allé 166, 2820 Gentofte.

Sunnudagin 1.7.2007 giftast Anvør Dahl-Olsen og Henrik Weihe Joensen. Vígslan verður í Saksunar kirkju kl 13. Opið hús verður hjá Lars Gunnar og Málfryd í Saksun frá kl 14-20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 7. juli giftast Linda Mikkelsen Kjærbo úr Vági og Elnar Holm úr Porkeri, vígslan verður í Bethel í Vági kl. 14.00. Tey, ið vilja heilsa uppá brúðarparið, eru hjartaliga vælkomin í heim okkara í Porkeri eftir kl. 18.00.

Leygardagin 7. juli 2007 giftast í Munkebo kirkju á Fyn, Hans Atli Dahl úr Fámjin og Rudi Luid Øre úr Fuglafirði, búsitandi Toften 205 - DK 5330 Munkebo, Fyn.

Leygardagin 7. juli giftast Katrin á Fløtunum úr Lamba og Signar Rasmussen úr Kollafirði. Vígslan verður í Kollafjarðar kirkju kl. 13.00. Vælkomst verður frá kl. 16.00, inni í Firði 93 í Kollafirði.

Leygardagin 7. juli giftast í Havnar kirkju, Joan við Neyst úr Klaksvík og Jan Olaf Michelsen úr Tórshavn. Vígslan verður kl. 13.00 og brunch verður á Hotel Hafnia kl. 14.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 7. juli 2007 kl. 14 giftast í Oyndarfjarðar kirkju Winnie Zachariasen úr Syðradali S. og Julian A. Rasmussen úr Oyndarfirði. Borðhald verður fyri innbodnum kl. 17. Frá kl. 20 verður opið hús í skúlanum í Oyndarfirði, har ið øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 21. juli giftast Laila Æðustein Poulsen, Tórshavn, og Bergur Thomsen, Hoyvík. Vígslan verður í Ebenezer kl 14.00. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.30.

Leygardagin 21. juli giftast Annika Kallsgarð Joensen, Trøllanes og Martin Oht, Ringsted. Vígslan verður í Christians kirkjuni í Klaksvík kl. 14.00. Vælkomst verður í Skálanum kl. 21.30. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á telefon 0045 51683461, 456665 ella á mail kallsgard@gmail.com áðrenn 13. juli.

Leygardagin 21. juli giftast Lív Joensen úr Miðvági og Richard Johansen úr Sandavági. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 16.00. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at tekna seg við at ringja á tlf. 213737, 333737 ella 226999 áðrenn 1. juli.

Fríggjadagin 27 juli giftast Ása Danielsen og Heini Mohr Mortensen. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 16. Veitslan verður hildin í HB húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga okkum frá innan 7. juli á tlf. nr. 312413, 225352(Ása) ella 212413(Heini).

Fríggjadagin 27.7.07 giftast Elisabeth Joensen og Ingolf Gaard, bæði úr Klaksvík. Vígslan verður í Christianskirkjuni kl. 13. Vælkomst verður í Skálanum kl. 20. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf +45 41585758, 220749 ella gaard@post.olivant.fo, áðrenn 18.7.07.

Leygardagin 11. august 2007 kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Poula Patursson og Hanus Skaalum Midjord. Veitslan verður í Drekaskálanum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg í seinasta lagi 1. juli á tlf +45 22 10 85 20 ella teldupost hanuspoula@midjord.com

11. august giftast í Miðvági Jonrid Mikkelsen, Tórshavn og Fróði Clementsen, Tórshavn. Brúdleypið verður hildið í SÍF-húsinum. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 332800 ella 511331 áðrenn 1. juli.

Leygardagin 18. august giftast Birgit Thomsen, Klaksvík, og Janus Thomsen, Hvalba. Vígslan verður í Ebenezer kl. 10.00. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 12.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 593939 (Birgit) ella 593336 (Janus), áðrenn sunnudagin 5. august.